# LØGTINGSLÓG NR. 157 FRÁ 20. DESEMBER 2013 UM BROYTING Í LØGTINGSLÓG UM LØGTINGSINS UMBOÐSMANN

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 4, stk. 1 verður aftaná "(t.d. lands- og kommunalu)" sett: ", og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum".

**2.** Í § 4, stk. 2 verður "almennar skráir" broytt til: "viðgerð av persónsupplýsingum".

**3.** Í § 6 verða sum stk. 6 og 7 sett:

"*Stk. 6.* Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.

*Stk. 7.* Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum."

**4.** Í § 7, stk. 1 verður "kæru" broytt til: "klagu" og "kæruni" broytt til: "klaguni".

**5.** Í § 8 verður sum stk. 4 sett:

"*Stk. 4.* Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1."

**6.** Í § 12 verður sum stk. 2 sett:

"*Stk. 2.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá."

**§ 2**

*Stk. 1.* § 1, nr. 2-4 koma í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd. *Stk. 2.* § 1, nr. 1, 5 og 6 koma í gildi 1. oktober 2014.

Tórshavn, 20. desember 2013

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)** løgmaður

Lm. nr. 55/2013